# FYRISAGNIR

**Arbeiðsháttur**

Lærarin lesur alla fyrisøgnina í einum upp fyri næmingunum. Eftir upplesturin spyr hann næmingarnar, um ókend orð eru í tekstinum. Tey ókendu orðini verða umrødd í felag og gjøgnumgingin. Síðan lesur lærarin tekstin upp í brotum – tvey til trý orð í senn – tvær ferðir. Øll tekn verða lisin upp.

Næmingarnir skriva tekstin við hond. Tá ið allur teksturin er skrivaður, skriva næmingarnir hvør sín setning úr tekstinum á talvuna. Setningarnir verða rættaðir so við og við í felag á talvuni. Lærarin greiðir frá málllæru og ljóðreglum, meðan rættað verður.

NB. Fyrisagnirnar verða skrivaðar, tá ið tað innihaldsliga í teimum er lisið og gjøgnumgingið í arbeiðsheftinum. Tað vil siga, tá ið orðini eru vorðin kend.

## I

Ein sunnudag í januar kemur ein póllendingur við flogfari til Føroya. Tað er kalt og gott veður tann sunnudagin, tá ið hann lendir í Vágum. Høgni er á flogvøllinum og tekur ímóti honum. Póllendingurin eitur Szymon, og hann skal búgva saman við Høgna, meðan hann er í Føroyum og arbeiðir. Bæði Høgni og Szymon eru timburmenn, og teir skulu arbeiða og búgva saman í Tórshavn. *(375)*

## 2

Veðrið er gott, tá ið Høgni og Szymon koyra til Havnar, men soleiðis er tað ikki altíð um veturin. Veturin er bæði myrkur og vátur í Føroyum. Tað er ikki so kalt um veturin, men ofta er nógvur vindur og oysandi regn í dagavís. Um kuldin kemur, so verður frost og kavarok hesa árstíðina. Tað hendir ofta, at flogførini ikki fáa lent á flogvøllinum um veturin. *(359)*

## 3

Flogvøllurin í Vágum er einasti flogvøllur í Føroyum. Undir seinna kríggi vóru bretar í Føroyum, og teimum tørvaði ein flogvøll at lenda á við vøru og útgerð. Teir bygdu vøllin. Hann var tikin í brúk í 1943. Eftir kríggið var eingin flúgving til vøllin í mong ár, og hann fall í órøkt. Men í 1963 byrjaði reglulig flúgving til onnur lond, og tá kom lív aftur í flogvøllin. *(372)*

## 4

Tórshavn er høvuðsstaður í Føroyum. Føroyingar nevna eisini høvuðsstaðin fyri Havn. Havnin er størsti býurin í Føroyum. Her eru kirkjur og samkomuhús. Føroyingar eru trúgvandi og koma saman at hoyra Guds orð og syngja sálmar. Listin er savnað í Havn. Her ber til at fara til sjónleik, á konsert, at vitja listasøvn, at hitta rithøvundar og at venja ítrótt. *(358)*

## 5

Nógvir skúlar eru í Havn. Universitet, vinnuháskúlar, miðnámsskúlar umframt fólkaskúlar. Nógv ung fólk fara tó úr landinum og út í heim at nema sær útbúgvingar. Flestu studentarnir fara til Danmarkar og hini grannalondini, tí har er ókeypis at lesa. Fólk koma úr øllum landinum til Havnar. Býurin er nógv broyttur, tí nógv fólk flyta til býin. Alt er savnað í høvuðsstaðnum, og tí dámar øllum føroyingum at koma til Havnar. *(423)*

## 6

Í Føroyum eru 4 bankar, sum allir føroyingar brúka. Teir eru allir í Havn. Tveir av bankunum eru stórir. Teir eru teir elstu bankarnir. Teir eita Betri og BankNordik. Betri varð stovnaður í 1832. Hann hevur høvuðssætið í Havn. Hann æt Føroya Sparikassi, tá ið hann varð stovnaður. Eina tíð æt hann Eik. Hin stóri bankin eitur BankNordik. BankNordik er frá 1906. Eisini hann hevur høvuðssætið í Havn. Bankin æt upprunaliga Føroya Banki, tá ið hann varð stovnaður. Í 1994 varð Føroya Banki lagdur saman við Sjóvinnubankanum, sum varð stovnaður í 1932. *(550)*

## 7

Vit hava eisini tveir smærri bankar. Teir eita Norðoyða Sparikassi og Suðuroya Sparikassi. Norðoya Sparikassi er frá 1919. Hann hevur høvuðssætið í Klaksvík. Suðuroya Sparikassi er frá 1943. Hann hevur høvuðssætið í Vági. Øll, sum sum arbeiða í Føroyum og fáa løn, mugu hava eina konto í einum av hesum bankunum, tí í Føroyum gjalda vit samtíðarskatt. *(350)*

## 8

Høgni og Szymon koyra oman á kaiina, tí har er gott pláss at seta bilin. Har eru so nógv parkeringspláss. Í Havn eru nógvir bilar, og tað er ofta ringt at finna eitt pláss at seta bilin. Bilar mugu setast á víss pláss, tí annars kann eigarin fáa bót. Parkeringsvaktir ganga runt í Havnini og kanna, um bilar standa lógliga ella ólógliga. *(337)*

## 9

Havnarøkið hevur ikki bara týdning fyri Havnina, men fyri alt landið. Størsti parturin av øllum innflutningi til landið verður lossaður her, og flestu ferðafólkini koma og fara um Havnina. Havnarøkið er bygt út og víðkað fleiri ferð ígjøgnum tíðina. Tøl frá 2021 siga, at árliga koma og fara 3.400 skip um Tórshavnar havn, og 680.000 tons fara um kaikantin. Her hevur altíð verið lívligt. Fyrr lógu nógv fiskiskip við kai her. Eisini enskir trolarar úr Hull og Grimsby og týskir trolarar úr Bremerhaven og Cuxhaven. *(515)*

## 10

Høgni, sum er føddur og uppvaksin í Havn, vísir póllendinginum, Szymon, runt í Havn. Teir byrja á kaiini og vitja kaiøkið, Skansan og Tinganes. Skansin varð bygdur um ár 1580. Hann vardi Havnina, tá ið ófriðarskip vitjaðu. Navnið, Tinganes, vísir til, at ting var hildið har í víkingatíðini.Teir ganga síðani víðari niðan í miðbýin. Í miðbýnum er nógv ferðsla og nógv fólk. Vit nevna miðbýin Vaglið. *(400)*

## 11

Szymon skal stovna sær eina lønarkonto, so hann kann fáa løn. Øll í Føroyum fáa løn umvegis banka. Teir báðir fara tí í ein banka, og har stovnar Szymon sær eina konto. Hann stovnar eisini eina aðra konto. Hana fer hann at brúka til uppsparing. Szymon hevur familju í Gdansk, og tí skal hann senda part av lønini heim til konu sína og børnini. *(343)*

## 12

Høgni og Szymon skulu arbeiða ymsastaðni í Føroyum. Tá ið teir eru lidnir at arbeiða í Havn, fara teir til Suðuroyar. Tað arbeiðið hastar, og har kunnu teir arbeiða inni. Tað er gott at kunna smíða inni, tá ið veðrið er keðiligt. Teir skulu sigla suður við Smyrli og koyra runt við arbeiðsbilinum. Tá hava teir øll ambboðini hjá sær. Tað er tað lættasta. Høgni kennir fólk, sum teir kunnu búgva hjá. *(397)*

## 13

Tvøroyri er størsti býurin í Suðuroynni. Hann er gamal handilsstaður í Føroyum. Har vóru tey størstu handilshúsini í Føroyum í 1800-talinum. Bygningarnir standa enn niðri á kaiini. Fólk komu úr øllum Føroyum at sigla við fiskiskipum og at arbeiða í fisk í Suðuroynnii. Nú eru 1770 íbúgvar á Tvøroyri. Í dag er Tvøroyri ein modernaður býur við nógvum arbeiðsplássum innan fiskivinnuna. *(384)*

## 14

Teir skulu eisini arbeiða í Klaksvík. Klaksvík er næststørsti býurin í Føroyum. Har búgva 5.400 fólk. Býurin liggur á Borðoynni í norðurøkinum. Klaksvík er ein lívligur býur við nógvum virksemi. Har er flakavirki og nógvum fiskiskipum. Har er stórt bryggjarí, sum bryggjar øl og sodavatn til alt landið. Har eru  eisini nógvir handlar og  sterkt ítróttafeløg. *(358)*

## 15

Høgni og Szymon skulu eisini arbeiða í Runavík. Har skulu teir umvæla eini hús. Teir fara at umvæla húsini í juli, tí tá fara húsfólkini út í víðu verð at ferðast. Nógvir føroyingar ferðast til onnur lond um summarið. Runavík hevur stóra havn. Har koma stór ferðamannskip á vitjan. Nógv fiskiskip landa til virkini á kaiini, og nógvur farmur kemur við farmaskipum. Nógvar fyritøkur eru knýttar at alivinnuni og fiskivinnuni.  *(426)*

# MÁLLÆRA

## Navnorð

**Finn navnorðini og bend tey**
í eintali óbundin í hvørfalli, hvønnfalli og hvørjumfalli.

**Býur, runt, hann, kai, síggja, vísir, miðbýin, ganga, veðrið, løn, eisini, renna, ferðsla, niðan, skal, fer, konto.**

| Hvørfall | Hvønnfall | Hvørjumfall |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

# Sagnorð

**Finn sagnorðini og set tey í navnhátt og bend tey**
í 1., 2. og 3. persóni í eintali í nútíð

**Býur, runt, hann, kai, síggja, vísir, miðbýin, ganga, veðrið, løn, eisini, renna, ferðsla, niðan, skal, fer, konto.**

| Navnháttur | 1. persónur | 2. persónur | 3. persónur í eintali nútíð |
|---|---|---|---|
| *at* | *eg* | *tú* | *hann, hon, tað* |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

# Sagnorð

**Bend sagnorðini**
í nútíð í 1., 2. og 3. persóni í eintali

**mugu, eru, eita, hevur, lagdur**

| Navnháttur | 1. persónur | 2. persónur | 3. persónur í eintali nútíð |
|---|---|---|---|
| *at* | *eg* | *tú* | *hann, hon, tað* |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

# At benda sagnorð

**Set rætta formin í nútíð av *búgva* inn í setningarnar:**

Eg ______ í Havn.

Beiggi mín ______ eisini í Havn.

Mostir mín og maður hennara ______ ikki í Føroyum.

Hvar ______ tú?

**Set rætta formin í nútíð av *taka* inn í setningarnar:**

Eg ______ ikki bilin við í kvøld.

Szymon og Høgni ______ ongan annan persón við til Havnar.

Tú ______ pengar við til biografin.

Eyð ______ matin av borðinum.

Tit ______ hundin við tykkum.

**Set rætta formin í nútíð av *koyra* inn í setningarnar:**

Høgni ______ Szymon til Havnar.

Teir ______ oman á kaiina.

Dóttirin ______ við bussi.

Vit ______ á súkklu til Kirkjubøar.

Eg ______ tey ikki í kvøld, tú ______ meg.

**Finn 8 sagnorð ímillum hesi orðini og skriva tey:**

Sova, ferðast, inni, hús, flogfar, handski, súkkla, kona, kaka, lastbilur, dukka, minnast, renna, vøruvognur, sól, buksur, hýrivognur, klippa, lampa, bilur, skriva, tyrla, bók, hundur

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |

**Lógu, stórur, gott, trolarar, enskir, legði, hús, bust, hvølva, seta, brún, gonga, sita, bygd, barn.**

**Finn sagnorðini omanfyri og bend tey í eintali og 1., 2. og 3. persóni í nútíð:**

| Navnháttur | 1. persónur | 2. persónur | 3. persónur í eintali nútíð |
|---|---|---|---|
| *at* | *eg* | *tú* | *hann, hon, tað* |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

Finn navnorðini:

**Lógu, stórur, gott, trolarar, enskir, legði, hús, bust,**
**hvølva, seta, brún, gonga, sita, bygd, barn.**

Finn navnorðini omanfyri og bend tey í eintali óbundin og hvør-, hvønn- og hvørjumfalli. Set ein ella eitt framman fyri navnorðið og skriva kynið *(M – F – N)*

| Kyn | Hvørfall | Hvønnfall | Hvørjumfall |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

**Lógu, stórur, gott, trolarar, enskir, legði, hús, bust, hvølva, seta, brún, gonga, sita, bygd, barn.**

**Finn lýsingarorðini omanfyri og bend tey í kallkyni hvørfalli, hvønnfalli og hvørjumfalli í eintali**

| Hvørfall | Hvønnfall | Hvørjumfall |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

**Set rætta persónsfornavnið inn fyri sernøvnini í hesar setningarnar:**

_____ vóru her í gjár *(Hanna og Kristina).*

_____ rann allan vegin heim *(Hanna).*

_____ gekk aftan á henni *(Óli).*

_____ sóu Óla arga hana *(mamma og eg).*

**Set rætta formin av sagnorðinum í nútíð og tátíð inn í gloppið.**

Eg _____ sjúk í gjár *(vera)*, og eg _____ sjúk í dag *(vera).*

Tey _____ heim nú *(renna)*, og tey _____ í gjár *(renna).*

Tú _____ í Kaldbak nú *(búgva)*, men fyrr _____ tú í Havn *(búgva).*

Símun _____ í Kvívík fyrr *(búgva)*, men nú _____ Símun í Klaksvík *(búgva).*

Barnið _____ hvønn dag *(svimja)*, og barnið _____ eisini í fjør *(svimja).*

**Skriva, hvat kyn navnorðið er**
*(M fyri maskulinum, F fyri femininum og N fyri neutrum):*

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bátur | | Skip | | Hús | | Tekja | | Súkkla | |
| Bøur | | Vegur | | Lampa | | Fuglur | | Bók | |
| | | Amboð | | Vindeyga | | Himmal | | | |

**Set lýsingarorðið inn í røttum formi:**

Símun er ein ______ *(gamal)* maður.

Hanna er ein ______ *(ungur)* genta.

Húsið ______ *(reyður)*. Bólturin er ______ *(reyður)*.

Vøggan er ______ *(reyður)*.

**Set rætta formin í nútíð av sagnorðinum at *hava* inn í gloppið:**

Ása ______ frí í dag.

Óli og Hanus ______ fingið løn í dag.

Mikines og hansara vinmenn ______ málað í dag.

Eg ______ ongan beiggja.

______ tú nakra systur?

Tær ______ runnið kapp í morgun

Tit ______ gingið langt í gjár.

**Set rætta formin í nútíð av sagnorðinum at *fáa* inn í gloppið:**

Nú ____ tit skjótt frí.

____ tú frí á páskum?

Eg ____ einar skógvar frá mammu míni.

Maria ____ ongan ferðaseðil frá manninum.

Dora og Hannis ____ nýggjar bussar í summar.

Vit ____ egg at rulla 2. páskadag.

Magnus, ____ tú eisini nýggjan buss at koyra?

**Skriva ein setning við hesum orðunum:**

Tey, hvønn, frí, sunnudag, hava, leygardag.

**Skriva, hvat kyn navnorðið er**

*(M fyri maskulinum, F fyri femininum og N fyri neutrum)*:

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vika | | Dagur | | Skúlatíð | | Bussur | | Børn | |
| Fundur | | Tíð | | Setningur | | Orð | | Familja | |

# ORÐFEINGI

**Finn antonym ímillum orðini niðanfyri og para tey**

ill, hoppa, glað, flenna, renna, kenna, bleytt, gráta, rópa, vøkur, korn, halda, hús, ganga, teska, ljót, høgur, bygningur, kona, lágur, myrkur, býtt, grønur, smátta, ljósur, grátt, høghús, fitt og hart.

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

**Finn tey orðini, sum tað ber til at brúka til flutning:**

Sova, ferðast,koyristólur, inni, hús, flogfar, handski, súkkla, kona, kaka, lastbilur, dukka, minnast, renna, vøruvognur, sól, buksur, hýrivognur, klippa lampa, bilur, skriva, tyrla, bók, hundur, vognur

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |

**Hvørji navnorð eru kvennkyn:**

Hús, kamar, ketta, borð, taska, matur, sól, pennur,
planta, mynd, stólur, hattur, krúss, krukka.

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |

**Vel rætta svarið til spurningin og set tað inn:**

| | |
|---|---|
| Szymon er úr ______ | **Bulgaria Danmark Póllandi** |
| Hann er ______ | **timburmaður sveisari bakari** |
| Í Føroyum búgva ______ fólk. | **70.000 54.000 105.000** |
| Flogvøllurin er í ______ | **Suðuroy Eysturoynni Vágum** |
| Handilsmiðstøðin SMS liggur í ______ | **Runavík Havn Tvøroyri** |
| Í Føroyum eru ______ bankar. | **7 5 4** |
| Tórshavnar havn er ______ havn í Føroyum. | **største minsta hægsta** |

**Stigbend hesi lýsingarorðini:**

| | | |
|---|---|---|
| Gomul | | |
| Lítið | | |
| Stuttur | | |
| Vakur | | |

**Vel rætta orðið og set tað inn í gloppið í setningunum niðanfyri:**

land, bygd, minsti, býur, seyður, høvuðsstaður, oyggj, størsti, kai, kirkjur, høll, móttøka, trúgvandi, familja, brúgv, borð, fjall, sálmar, gongubreyt, sjónleik, sjúkrahús, listasøvn, vøtn, trø, hagi, ítrótt

Tórshavn er ______ í Føroyum. Føroyingar nevna eisini høvuðsstaðin fyri Havn. Havnin er ______ býurin í Føroyum. Her eru ______ og samkomuhús. Føroyingar eru ______ og koma saman at hoyra Guds orð og syngja ______ . Listin er savnað í Havn. Her ber til at fara til ______ , á konsert, at vitja ______ , at hitta rithøvundar og at venja ______ .

**Lesið tekstin upp tvey og tvey. Finn tey orðini, ið tit ikki kenna og skrivið tey niður, tá ið tit hava kannað, hvat tey merkja.**

Hanna og beiggi hennara fóru ein vakran morgun til Havnar. Tey áttu eina eldri systur, sum æt Sonja, og sum tey ikki høvdu sæð leingi, og nú gleddu tey seg at vitja hana. Hon hevði fingið ein lítlan son. Á, sum tey vóru spent at síggja hann.

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |